


*Sam Jacobsen og hinir í Víkingi taka um vikuskiftið aftur ímóti Stig-Roar Søbstad og teimum í B68, sum mikukvøldið vunnu seg víðari í steypakappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Víkingur vil hava hevnd

**FÓTBÓLTUR** Toppdysturin hetta umfarið er uttan iva tann í Klaksvík millum KÍ og B36, men eisini er áhugaverdur dysturin í Gøtu millum Víking og B68, sum er endurtøka av fjórðingsfinaluni mikukvøldið, sum Víkingur óivað vil hava uppreisn fyri

**Hilmar Jan Hansen**

Fyrsti dysturin í sætta umfari í Vodafonekappingini verður spældur í morgin í Sarpugerði, har talan er um eina endurtøku frá mikukvøldinum, tí har hittast Víkingur og B68 aftur. Mikukvøldið spældu liðini í 120 minuttir, áðrenn fjórðingsfinalan teirra millum mátti avgerast við brotsspørkum, so lítið man vera at ivast í, at Víkingur vil hava hevnd og vinna hesa ferð. Tað vilja toftamenn óivað eisini, men so fæst at síggja, hvussu nógv menn orka eftir drúgva fótbóltskvøldið fyrr í vikuni.

Uppflytararnir í KÍ hava staðið seg óvæntað væl higartil, men hesa ferð eru teir aðru ferð á rað vertir fyri dysti ímóti einum av hinum liðunum, ið er komið væl frá byrjan í landskappingini, B36, sum higartil er einasta liðið, ið ikki hevur tapt. KÍ tapti sín fyrsta dyst, tá NSÍ vitjaði leygardagin, meðan B36 við sigri á EB/Streymi setti seg á oddasessin. Helst eru gestirnir favorittar, men unga KÍ-liðið hevur víst, at tað sakt-ans kann bíta frá sær.

Við Løkin í Runavík tekur eitt av teimum fremstu liðunum, NSÍ, ímóti einum av teimum lægru, 07 Vestur, ið eisini er uppflytari. Runavíkingar ruku úr steypakappingini í vikuni og vilja óivað vísa, at teir eru tyngri at syfta í landskappingini, men hinvegin vil 07 Vestur heldur enn gjarna ríða víðari á bylgjuni, ið er farin at geva stig í landskappingini og mikukvøldið gav hálvfinalupláss í steypakappingini.

Hóast HB ikki hevur gjørt tær stóru skreytirnar í kappingini higartil, er dysturin um vikuskiftið ímóti EB/Streymi eitt slag av eld-dópi. Stigini, HB higartil hevur skavað saman, hava verið ímóti lægri liðum, men nú eitt av teimum fremstu vitjar, skal meira til. EB/Streymur vísti stórspæl ímóti NSÍ mikukvøldið, men tapti í Gundadali fyri viku síðani, so helst fara sundalagsmenn at gera alt fyri ikki at tapa tvær ferðir upp í slag í høvuðsstaðnum.

Mikukvøldið hevði ÍF lættastu mótstøðuna í steypakappingini, og nú landskappingin er á skránni, má aftur staðfestast, at ÍF hevur veikasta mótstøðuliðið av øllum, tí higartil hevur B71 púrt einki víst í undanfarnu dystunum, annað enn eina gapandi verju, ið kundi verið ein hóskandi freisting hjá fuglfirðingum, sum mikukvøldið skoraðu sjey ferðir, tá AB vitjaði. Her er ÍF uttan nakran sum helst iva stórfavorittur.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# 100 kilometrar á landsvegnum

**Hilmar Jan Hansen**

Um vikuskiftið fara súkklararnir aftur á vegirnar við einari FM-kapping, og hesa ferð er tað meistaraheitið á 100 kilometra landsvegateininum, ið stendur upp á spæl.

Súkklað verður frá Svimjihøllini í Havn til Saksunar og aftur til Havnar, har vent verður við rundkoyringina við Skansan og súkklað niðan til Plantusøluna hjá Skógrøkt Landsins, har málið er.

Kappingin byrjar klokkan 10, og væntandi verða fyrstu súkklararnir á málinum umleið klokkan 13. Kappast verður í bólkunum elita, motión og unglingar.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið

**VODAFONE-DEILDIN**

07/05 15.00 Víkingur - B68
08/05 15.00 KÍ - B36
08/05 15.00 ÍF - B71
08/05 15.00 NSÍ - 07 Vestur
08/05 15.00 HB - EB/Streymur

**1. DEILD, MENN**

07/05 15.00 TB - AB
07/05 15.00 FC Hoyvík - HB II
07/05 17.00 07 Vestur II - Skála
07/05 17.00 EB/Streymur II - NSÍ II
07/05 17.30 Víkingur II - FCS

**1. DEILD, KVINNUR**

08/05 12.30 KÍ-B36
08/05 13.00 Skála-HB
08/05 17.00 AB-Víkingur

# Føroyingar til HM í borðtennis

**BORÐTENNIS** Fyri fyrstu ferð síðani í síðani í 80-unum eru føroyskir borðtennisspælarar um vikuskiftið við til HM-kappingina, sum hesa ferð er í Rotterdam í Hollandi

**Hilmar Jan Hansen**

Teir fimm føroysku spælararnir, sum fara avstað, eru Hallur Thorsteinsson (Tór), Fróði F. Jensen (Tór), Pætur Albinus (Tór), Rakul Mikkjalsdóttir (TBF) og Henrietta Nielsen (Søhøjlandet, Danmark). Í Rotterdam kunnu teir uppliva heimsins bestu spælarar, sum allir eru við til HM.

Føroysku spælararnir fáa í kappingini sera harða mótstøðu, tí í undankappingini til sjálva høvuðskappingina verður spælt í bólkum við trimum spælarum. Har eru føroysku spælararnir styrkismettir sum tríarar, meðan hinir báðir spælararnir í hvørjum bólki eru at finna sum nummar umleið 100 og 200 á heimsstyrkilistanum.

Hetta er eitt ógvuliga stórt lop fyri føroysku spælararnar, sum fyri tað mesta kappast í heimligu kappingini og síðani eru við til nakrar kappingar í Danmark árliga. Kortini hava teir við góðari hjálp frá nýggja landsliðsvenjaranum, Jan Berner úr Svøríki, roynt at fyrireikað seg sum frægast.

Eitt nú hava føroyingarnir verið á trimum venjingarlegum í Kina, ið í kappingum í Danmark, umframt at vant hevur verið meira sum heild, so føroyska landsliðið nú helst er betur fyri enn í mong ár.

HM-kappingin um vikuskiftið skal í fyrstu syftu brynja leikararnar til Oyggjaleikirnir, sum vera í juli. Á Oyggjaleikunum er mótstøðan somuleiðis stinn, og kann henda sera sterka mótstøðan í HM lyfta spælararnar tað síðsta upp um tær ógvuliga fáu tjóðirnar, sum eru framman fyri Føroyar á Oyggjaleikunum.

Hjá Føroyum stendur eitt nýtt ættarlið klárt at taka um endan, ið fevnir um spælarar úr 17 upp í 20 ára aldur. Nýkosni føroyameistarin, 22 ára gamli Ragnar Egilsson, verður ikki við til HM vegna lesnað, men hann verður tó við á Oyggjaleikunum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Wilbek vitjar

**Hilmar Jan Hansen**

Seinnapartin í gjár kom kendi danski hondbóltsvenjarin, Ulrik Wilbek, til Føroya sum gestur hjá Hondbóltssambandinum.

Longu í gjárkvøldið eygleiddi hann A-landsliðið hjá bæði kvinnum og monnum, sum vandu í Hoyvíkshøllini, og tað ger hann aftur í dag og í morgin.

Somuleiðis verður í morgin móttøka og og fyrilestur við Ulrik Wilbek í sonevndu Pyramiduhøllini í Hoyvíkar skúla.

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 3 | 2 | 0 | 10 | 3 | +7 | 11 |
| 2 | KÍ | 5 | 3 | 1 | 1 | 14 | 6 | +8 | 10 |
| 3 | EB/Streymur | 5 | 3 | 1 | 1 | 9 | 4 | +5 | 10 |
| 4 | NSÍ | 5 | 3 | 1 | 1 | 9 | 7 | +2 | 10 |
| 5 | Víkingur | 5 | 2 | 2 | 1 | 12 | 6 | +6 | 8 |
| 6 | HB | 5 | 2 | 1 | 2 | 8 | 5 | +3 | 7 |
| 7 | ÍF | 5 | 2 | 1 | 2 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 8 | B68 | 5 | 1 | 1 | 3 | 9 | 8 | +1 | 4 |
| 9 | 07 Vestur | 5 | 0 | 2 | 3 | 4 | 13 | -9 | 2 |
| 10 | B71 | 5 | 0 | 0 | 5 | 1 | 23 | -22 | 0 |